# JÓLARADIO Á **RÁS 2**

**Leygardagin og sunnudagin fer Rás 2 at hava beinleiðis sendingar við práti, samrøðum, reportasjum og góðum tónleiki. Skiftandi vertir fáa gestir í studio, ringt verður til fólk í Føroyum og uttanlands, og reportarar eru úti við mikrofonini.**

**Leygardagin kl. 11.00-18.00** **Sunnudagin kl. 14.00-20.00**



## Flóttarfólk til Føroya?

Taka føroyingar ikki nóg stóra ábyrgd í trupulleikum úti í heimi, eru føroyingar líkasælir og skuldu Føroyar tikið ímóti flóttarfólki. Tað fara vit at tosa um við Firouz Gaini og Elin Mortensen, sum bæði hava tilknýti til Amnesty í Føroyum.

LEYGARDAGIN KL. 11.15



## Jólafriður millum Eidesgaard og Hoydal

Fáa vit jólafrið at valda millum politisku stríðsmenninar Jóannes Eidesgaard og Høgna Hoydal, tá ið teir hittast til jólaprát á Rás 2? Hvat gott kunnu teir siga um hvønn annan, og hvørja gávu fara teir at geva hvørjum øðrum?

LEYGARDAGIN KL. 12.15



## Ferðandi organistur

Musikalski havnamaðurin Heri Eysturlið arbeiðir sum organistur, kórleiðari, pianistur og tónleikalærari í Stockholm. Í jólamánaðinum verður hann biðin til mangt og hvat í sambandi við jólahald í svenska høvuðsstaðnum. Vit práta við Hera Eysturlið um hansara jólavirksemi.

LEYGARDAGIN KL. 15.10



## Føroyingar úti í heimi

Rás 2 fer at ringja til føroyingar, sum eru búsitandi uttanlands, har teir eisini halda jól. Millum tey, sum ringt verður til í sendigunum leygardagin og sunnudagin, eru Njál Djurhuus í Oslo og Katrin Leo í Ljubljana.

LEYGARDAGIN KL. 14.00-18.00
SUNNUDAGIN KL. 14.00-18.00



## Prát úr býnum

Rás 2 hevur eisini fólk í markini um vikuskiftið. Leygardagin fer Kári Mikkelsen at gera prát úr Havnini, og sunnudagin verða Annika Steintórsdóttir og Elin Heinesen úti við mikrofonini í Eysturoynni og Klaksvík.

LEYGARDAGIN KL. 14.00-18.00
SUNNUDAGIN KL. 14.00-18.00



## Fríski jólasangir

Eyðfinn & James velja 10 teir frískastu jólasangirnar

SUNNUDAGIN KL. 18.00-20.00


Kári


Jan


Eyðun


Heri


Annika & Elin


Eyðfinn & James

RÁS 2 ...títt radio